Betala skuld ni›ur og byggja út

At betala so nógv av skuldini sum gjørligt, er eitt høvu›smál hjá bygdará›num ta› komandi valskei›i. Men útbyggingar skulu eisini gerast, bæ›i í Sandvík og í Hvalba

KOMMUNU-POLITIKKUR
Áki Bertholdsen

Kanska ongin kommuna í landinum hevur so nógv sjófólki okkara og teimum, sum abei›a vei›i teirra undan, at takka, sum Hvalbiar Sóknar Kommuna. Tí vilja vit geva teimum tær bestu umstø›ur at virka undir, bæ›i á sjógvi og landi, sigur Levi Niclasen, sum her stendur ni›ri á keiini.

– Hetta komandi valskei›i› ver›ur ta› eitt høvu›smál hjá kommununi at betala so nógva skuld, sum til ber.

Ta› sigur Levi Niclasen, sum nú fer undir eitt n‡tt skei› sum bygdará›sforma›ur í Hvalbiar Kommunu.

Hann sigur, at kommunan skyldar gó›ar 15 milliónir og ta› er álei› hálvonnur álíkning.

Hóast hetta ikki er so ovurhonds skuld, afturímóti fleiri ø›rum kommunum, førir ta› til bindingar og tær ætla vit at sleppa av vi›, sigur hann.

Men annars ætlar bygdará›i› sær fyrst og fremst undir at fremja nakrar útbyggingar, sum longu eru samtyktar.

Í fyrstu atlløgu hevur fráfarandi bygdará› samtykt at byggja skúlan í Sandvík út. Fari› ver›ur undir ta› útbyggingina fyrst í komandi ári, so skjótt sum gó›kendar tekningar eru fingnar til vega.

Ætlanin er at byggja tvær skúlastovur upp í eystara enda á skúlanum. Hvør stova ver›ur f‡ra metrar long og onnur skal brúkast til teldurúm og hin til evning.

Sí›ani er ta› eisini samtykt at frí›ka Geilina, sum er eitt stykki mitt í bygdini í Sandvík. Í tí sambandinum er ætlanin at flyta minnisvar›an yvir skaldi›, Martin Joensen, sum stendur uppi vi› skúlan, oman í Geilina, har barnaheim hansara var.

Ein tri›ja samtykt, sum fari› ver›ur undir í næstum, er at brei›ka vegin ígjøgnum Gar›sina, sum er ein b‡lingur í Hvalba.

Annars er bygdará›i› fari› undir eitt anna› stórt tiltak, og ta› er at d‡pa havnina. Ta›, at havnin hevur veri› ov grunn, hevur veri› til stóran ampa, bæ›i hjá skipum og virki.

– Ta› er bara í bestu líkindum, at tveir bátar hava kunna› ligi› í havnini ísenn. Annars hevur veri› ney›ugt at flyta ein bát, upp á Tvøroyri, hvørja fer› ein annar hevur skula framat at avrei›a. Ta› hevur eisini veri› ney›ugt hjá bátum at leggja fiskin upp á Tvøroyri og so at koyra hann til Hvalbiar.

Eftir at havnin er d‡pt, ver›ur ongin trupulleiki at hava fleiri bátar inni ísenn. Í løtuni er ætlanin at d‡pa tveir tri›ingar av hylinum. Hetta arbei›i kostar 4,7 milliónir. Men Levi Niclasen sigur, at fæst fígging, er ætlanin at d‡pa allan hylin. Ta› er J.&K. Petersen, sum stendur fyri arbei›num.

– Kanska ongin kommuna í landinum hevur so nógv sjófólki okkara og teimum, sum abei›a vei›i teirra undan, at takka, sum Hvalbiar Sóknar Kommuna. Tí vilja vit geva teimum tær bestu umstø›ur at virka undir, bæ›i á sjógvi og landi, sigur Levi Niclasen

Annars letur samb›li› upp hálvan januar og fyrsta dagin ver›ur l‡st í blø›unum, at fólk kunnu søkja um at sleppa inn.

Skulu nú hava almennar fundir

Hereftir skulu allir b‡- og bygdará›sfundir hjá øllum kommunum, ver›a almennir

LÓGARBROYTING
Áki Bertholdsen

Nú tey n‡valdu b‡- og bygdará›ini fara undir n‡tt valskei›, ver›a tey flestu av teimum noydd til at venja seg vi› eina stóra broyting. Og ta› er, at frá 1. januar, skulu allir b‡ og bygdará›sfundir ver›a almennir – eisini teir í Mykinesi og í Saksun.

Sostatt fer almenningurin nú at fáa munandi betri innlit í arbei›i› hjá b‡- og bygdará›unum.

Í n‡ggju kommunulógini, sum kemur í gildi 1. januar stendur nevniliga klárt og greitt, at kommunust‡risfundir eru almennir.

Hetta stó› eisini í lógini, sum nú fer í gildi. Men har vóru nøkur undantøk. Eitt nú kundu kommunur, har færri enn 1.000 fólk bú›u, søkja um at sleppa at hava almennar fundir.

Hilmar Høgenni á Kommunala Eftirlitinum, sigur, at endamáli› vi› hesum var, at smærri kommunur skuldi fáa umstø›ur til at fyrireika seg til at hava almennar fundir.

–Ætlanin var ongantí›, at tær skuldu halda fram at hava fundir fyri afturlætnum hur›um.

Hilmar Høgenni sigur, at í teirri n‡ggju lógini, sum kemur í gildi› á n‡ggjárinum, eru hesi undantøkini tikin úr lógini.

Sostatt skulu allir b‡- og bygdará›sfundir nú ver›a almennir.

Men í serstøkum førum, kann bygdará›i› gera av, at einstøk mál ver›a vi›gjørd fyri stongum hur›um.

Einastu undantøkini frá reglunum um at fundirnir skulu vera almennir, eru mál, har trúna›aruppl‡singar væntandi ver›a drignir fram undir málsvi›ger›ini. Men har trúna›aruppl‡singar bara kunnu væntast at ver›a drignir fram í einum møguligum kjaki, er ongin orsøk til at hava fund fyri afturlætnum hur›um. Talan kann m.a. vera um mál, har persónligir uppl‡singar koma fram.

Annars stendur eisini, at kommunur, har minst 500 fólk búgva, skulu eisini hava borgarstjóra, sum er minst hálva tí›.

Men bara, tái› borgarstjórin er fulla tí›, er ta› ney›ugt hjá honum at leggja ta› borgarliga starvi› ni›ur íme›an hann er borgarstjóri.

Levi Niclasen tekur eitt tørn afturat

KOMMUNUMÁL
Áki Bertholdsen

Ta› er nú gjørt av, at Levi Niclasen heldur fram sum bygdará›sforma›ur í Hvalbiar Kommunu eitt valskei› afturat.

Hann er eisini bygdará›sforma›ur hetta valskei›i› og á kommunuvalinum næstseinasta t‡sdag, fekk hann so dygga álitisváttan frá veljarunum, at hansara listi er blivin førur fyri at mynda meirilutan í bygdará›num einsamallur næsta valskei›. Hansara listi fekk f‡ra av teimum sjey bygdará›slimunum. Sjálvur var› Levi Niclasen fyrstvaldur vi› nógv flestum atkvø›um, hann fekk 105 atkvø›ur, sum er næstan tvær fer›ir so nógv, sum tann fekk, i› hev›i næstflestar atkvø›ur.

Ein annar listi fekk hinar tríggjar limirnar. Tveir a›rir listar stilla›u upp, men fingu onki umbo›.

Listin, sum Levi Niclasen var› valdur á, hev›i fund nú eitt kvøldi›, og har var› gjørt av, at Levi Niclasen skuldi halda fram sum bygdará›sforma›ur. Niels Jacob Thomsen ver›ur næstforma›ur.

Eftir lógini skal Hvalbiar Kommuna minst hava borgarstjóra í hálvum starvi. Á listanum hjá Levi Niclasen halda tey, at ta› er nóg miki›, at hann er borgarstjóri hálva tí›. Ta› fer ikki at ávirka hansara borgarliga starv sum er at vera skúlalei›ari í Hvalba.

Eftir lógini, skal bygdará›i› í Hvalba nú eisini skipa seg í nevndir. Talan er um tr‡mannanevndir, har í listin vi› meirilutanum fær tvey umbo› og andstø›ulistin ta› tri›ja umbo›i›.

Í fíggjarnevndini er bygdará›sforma›urin føddur forma›ur. Afturat sær fær hann Katrin Joensen av meirilutalistanum.

Í havnanevndini ver›ur Otto West forma›ur og hin nevndarlimurin fyri meirilutan ver›ur Niels Jacob Thomsen.

Í teknisku nevnd ver›ur Katrin Joensen forma›ur og hin nevndarlimurin fyri meilutan ver›ur Niels Jacob Thomsen.

Bygdará›i› fer at skipa seg formliga ein av fyrstu døgunum.

Hjálmur er kool

N‡ggi barnafilmurin hjá Fer›slutrygd var› frums‡ndur mánamorgunin. Høvu›sbo›skapurin í filminum er, at ta› er alney›ugt at hava hjálm á høvdinum, tá ein setur seg á súkkluna

FER‹SLUTRYGD
Stefan í Skorini

Fimm av teimum, sum hava stóran leiklut í filminum. Frá høgru: Hallur Joensen, Jóhan Dalsgar›, Henrietta Hammer, Finnbjørn Hansen og Albjørg Joensen

Mynd: Jens Kr. Hansen

Fer›slutrygd hevur lati› ein n‡ggjan teknifilm úr hondum, og hann kallast Battmass. Hetta er ein umseting av einum donskum hoyrispæli, sum Rådet for Større Færdselssikkerhed hevur gjørt.

Jóhan Dalsgar›, alias Jóhan í Kollafir›i, hevur lagt alt arbei›i› til rættis og føroyska›i eisini. Hann er bara væl nøgdur, nú filmurin endiliga er klárur at koyra í sjónbandstóli›.

Ta› sá eisini út til, at børnini, sum vóru til sta›ar vi› frums‡ningina, dámdu filmin væl.

Hoyrispæli› sjálvt var› fyrstu fer› at hoyra í Útvarpi Føroya í 1996, og ta› hevur veri› n‡tt umaftur til filmin, sum nú er gjørdur.

Ætlanin var fyrst, at hoyrispæli›, sum hev›i veri› í ÚF, skuldi gevast út sum ljó›band, men vegna peningatrot var hetta av ongum. Seinni eydna›ist at fáa stu›ul til útgávu av sjónbandi frá Skótahjálpini og Texaco Faroes Group.

N‡t hjálm

Søgan er um børn á súkklu, um súkkluhjálmar, endurskin, fer›slureglur og mangt og hvat um súkklur.

Høvu›spersónurin í filminum er Mass, sum er sjey ára gamal. Honum dámar væl at súkkla, og onkuntí› súkklar hann vi› vinkonuni, Tinu. Mass hevur eitt gott hugflog, og hann ímyndar sær mangt og hvat, tá hann er úti vi› súkkluni. Tá er hann Battmass og hon er Sóljugentan. Saman fara tey á eina spennandi fer›.

Bo›skapurin er, at øll, sum súkkla, mugu n‡ta hjálm. Ta› kann bjarga lívi tínum.

Nógvur tónleikur er í filminum, og ta› er eisini Jóhan í Kollafir›i, sum hevur gjørt tónleikin. Hann spælir sjálvur øll ljó›førini og hevur sett saman.

Ta› er ikki sami tónleikur, sum var› n‡ttur í danska hoyrispælinum, men Jóhan hevur gjørt n‡ggjan tónleik til filmin.

Finnbjørn Hansen hevur gjørt tekningarnar til filmin, og hann metir, at hann hevur gjørt eini 40 tekningar til filmin. Hvør tekning tekur eini 2-3 tímar hjá honum at gera.

Felagi› sjónband hevur framleitt filmin. Sjóband hevur sta›i› fyri teknisku samansjó›anini av myndum og ljó›i í samstarvi vi› Fer›slutrygd.

Ein av yngru flokkunum í Eysturskúlanum var eisini vi› til frums‡ningina. Tey hugna›u sær óført, me›an filmurin var› s‡ndur

Mynd: Jens Kr. Hansen

Øll børn fáa eitt eintak

Sjónbandi› Battmass er ætla› teimum seks ára gomlu børnunum. Øll børn í Føroyum eru av sær sjálvum limir í Fer›sluringi Barnanna, og sjónbandi› er ískoyti til anna› tilfar, sum tey í Fer›sluringi Barnanna fáa sendandi.

Á sjónbandinum er eisini ein undanfilmur, sum tekur tveir minuttir, i› sn‡r seg um súkkluhjálmar. At enda er eitt innslag á ein minutt um endurskin.

Stuttligt at hoyra ta› aftur

Tr‡ av børnunum, sum hava lagt røddir til filmin, vóru eisini og hugdu at frums‡ningini. Hallur Joensen, Henrietta Hammer og Albjørg Joensen tóku fyri f‡ra árum sí›ani røddirnar upp til hoyrispæli›. Tey eru øll úr Kollafir›i og eru í dag sekstan ára gomul.

– Ta› var ógvuliga stuttligt at vera vi› tá, og ta› er stuttligt at hoyra ta› aftur í filminum, siga tey tr‡.

Tey ivast eitt sindur í, um bo›skapurin í filminum kemur nóg greitt fram fyri smábørnum, tí kanska er í so nógvur dentur lagdur á søguna framum bo›skapin um at vera í hjálmi.

Røddirnar í filminum eiga Hallur Joensen, Henrietta Hammer, Albjørg Joensen, Mai Jacobsen, Hanna Tove Áarstein, Jóannes Niclasen, Páll av Teiginum og Jóhan í Kollafir›i.

Bók um føroyska bátin

Andras Mortensen, savnvør›ur á Føroya Fornminnissavni, hevur lati› úr hondum n‡ggja bók, sum sn‡r seg um tann føroyska bátin. Hon kallast »Hin føroyski ró›rarbáturin – sjómentir føroyinga í eldri tí›«.

Føroyski báturin hevur sta›i› og stendur sum ein av ímyndunum um føroyska fólkamentan, og sí›ani fimti-árini hava savnsfólk og onnur savna› inn tilfar til eina søguliga l‡sing av hesum t‡›andi parti av fólkalívinum.

Í bókini ver›a t‡›andi úrslit av hesi granskingini almannakunngjørd.

Í bókini ver›ur sagt frá føroysku bátunum í tí›arskei›num frá 17. øld fram til umlei› 1930, tá ta› gjørdist vanligt at seta maskinur í teir. Sagt ver›ur bæ›i frá bátasmí›i og frá gerandislívinum kring bátarnar, og nógv ver›ur gjørt burturúr at l‡sa alt hetta vi› myndum og tekningum.

Eitt nú eru í bókini uppmátingar av 34 bátum vi› tølum fyri hvussu teir gomlu ró›rarbátarnir vór›u gjørdir. Umframt at vera ein vísindalig l‡sing av, hvussu føroyingar fyrr lívbjarga›u sær av sjónum, er bókin eisini eitt íkast til or›askifti› um, hvussu føroyski báturin hoyrir til í núti›ar føroyskum mentanarlívi.

Bókin er í stórum broti og telur 354 sí›ur. Føroya Fró›skaparfelag og Føroya Fornminnissavn standa fyri útgávuni.